# Hava lopið stein av steini í 19 ár

**Tað hevur verið ein tungur burður og tí var tað ein stórur dagur, tá ið reisigildi var á nýggja fiskivinnuskúlanum í Vestmanna í gjár. Ein spurningur er nú, hvat gamli skúlin nú skal brúkast til**

REISIGILDI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Jákup Andreasen, stjóri á Fiskivinnuskúlanum*



- Vit hava lopið stein av steini í 19 ár.

Soleiðis tók Jákup Andreasen, stjóri í Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, til á almennum hátíðarhaldið í Vestmanna í gjár.

Orsøkin til at hátíðarhald var í Vestmanna í gjár, var tann, at tey høvdu reisigildi fyri tí nýggja Fiskivinnuskúlanum, sum verður bygdur á havnarlagnum í bygdini.

Tað, sum skúlastjórin sipaði til, er, at skúlin hevur húsast í fleiri ymsum hølum, síðani hann varð settur á stovn í 1989 og í dag renna tey ímillum fýra ymisk hús at halda skúla, tí alt rúmast ikki undir sama taki.

Talan er um umbygd sethús og okkurt loft í einum virkisbygningi.

Leingi hevur verið tosað um at byggja nýggjan skúla, men hann er altíð dottin niður ímillum tær politisku raðfestingarnar aftur, tá ið á stóð, men nú er so skjøtil settur á ein nýggjan skúlabygning.

Tí dylja tey ikki, at tað er eitt stórt framstig, at tey nú fáa hildið reisigildi fyri einum nýggjum fiskivinnuskúla, har tað ber til at hava alt virksemið undir somu lon.

Tað verður ein stórur fyrimunur fyri skúlagongdina.

Á reisigildinum vóru røður og tónleikur og aftan á bjóðaðu tey ein drekkamunn í nýggju Fjørukránni.

- Hetta er ein stórur dagur, sum eg havi bíðað eftir í fleiri ár, segði Jákup Andreasen, skúlastjóri, tá ið vit á Rás2 og Sosialinum hittu hann beint eftir reisigildi.

- Vit eru ómetaliga spent upp á at taka hendan nýggja og spennandi bygningin í brúk.

Hann segði, at tað eru 10 ár síðani, at tey av álvara fóru undir eina royna at fáa nýggjan skúla.

Nú fer at bera til at samansjóa undirvísingina og gera hana meiri spennandi.

Sjálvur heldur skúlastjórin, at tað hevur stóran týdning fyri Føroyar at vit hava ein dyggan fiskivinnuskúla.

- Tað mesta av okkara útflutningi er fiskur og alifiskur og tí er tað sjálvsagt, at vit hava eina fiskivinnuskúla í landinum.

Tað hevur verið upp á tal, at hetta bara skuldi vera fyrsta byggistig av atrimum og st skúlin eisini skuldi hava eina menningardeild og eina kunningardeild, men um tað verður veruleiki seinni, ein politiskur arbeiði.

Spurningurin er nú, hvat gomlu húsini hjá skúlanum skulu brúkast til. Sjálvur eigur skúlin eigur eitt av teimum húsunum og uppskot hevur verið frammi um at brúka tey til íverksetarahús, ella til næmingaheim til Fiskivinnuskúlan

Kristina Háfoss, Landsstýriskvinna í Mentamálum staðfesti, at í veruleikanum er tað Føroya fólk, sum er Føroya gull og skulu vit menna okkara fiskivinnu, er tað neyðugt at styrkja samanrenningina ímillum vitan og fiskiríkidømi og tí fegnaðist eisini hon um, at nýggi skúlin nú er í ljósmála.

Nýggi fiskivinnuskúlin verður liðugur í heyst.





